HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

**Djóralækni til Fiska- og djórasjúkudeildina**

**Arbeiðsuppgávur**
Starvið fevnir um allar uppgávur á deildini, undir hesum:

- Heilsuyvirvøka, sjúkudiagnostikk og staðfesting av fiska- og djórasjúkum
- Eftirlit og málsviðgerð í sambandi við fiskaaling
- Málsviðgerð í sambandi við inn- og útflutning av livandi djórum
- Yvirvøka av djórasjúkum, her verður serligur dentur lagdur á alifisk
- Fyrisiting av veterinerari lóggávu
- Luttøka í vaktarskipan fyri djóralæknarnar á stovninum

**Førleikakrøv**
Tú skalt hava djóralæknaútbúgving frá einum norðurlendskum háskúla ella djóralæknaútbúgving, sum kann síðustillast, soleiðis at tú kanst gerast løggildur djóralækni í Føroyum. Royndir innan fiskasjúkur og fyrisiting og/ella kunnleiki til føroysk viðurskifti er ein fyrimunur.

**Harafturat skalt tú:**
- Duga at samskifta í skrift og talu norðurlendskum og enskum.
- Arbeiða sjálvstøðugt og í toymi
- Duga at fasthalda yvirlitið um hart leikar á
- Hava kunnleika til og royndir við KT
- Hava koyrikort til bil

**Vit bjóða**
Eitt spennandi, avbjóðandi starv sum er fakliga fevnir breitt um djórasjúkuøkið. Viðkomandi og sjálvstøðugt arbeiði á einari deild við dugnaligum og áhugaðum starvsfólkum við góðari útbúgving og hollum royndum. Møguleiki fyri at fáa ávirkan á raðfesting av arbeiðsuppgávunum. Ein stovn, sum hevur stóran samfelagsligan týdning við tøttum sambandi til vinnuna og aðrar myndugleikar. Góðar møguleikar fyri førleikamenning.

**Setanartreytir**
Starvið er fulltíðarsett og lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Akademikarafelag Føroya. Sí www.lnd.fo

**Umsókn til starvið**
Umsókn við CV, avrit av prógvum v.m. skal sendast til Heilsufrøðiligu starvsstovuna, Falkavegur 6, 100 Tórshavn ella hfs@hfs.fo og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 5. mars 2010.

Nærri fæst at vita um starvið á www.hfs.fo við at venda sær til Bárð Enni, stjóra, tlf +298 556 468, e-mail benni@hfs.fo ella Susanne Kabell, djóralækna, +298 556 485, sk@hfs.fo.
Starvið er fulla tíð og verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Akademikarafelag Føroya, sí www.lnd.fo

*Heilsufrøðiliga starvsstovan er stovnur undir Vinnumálaráðnum. Endamál stovnsins er at umsita matvørulógina og djórasjúkulógina.*

*Fiska- og djórasjúkudeildin hevur eftirlit við djórasjúkulógini. Hetta er eitt breitt arbeiðsøki, ið fevnir um nógvar vinnugreinir í Føroyum. Í tøttum samstarvi við vinnuna hevur serligur dentur verið lagdur á at skapa tryggar veterinerar karmar fyri alivinnuna í Føroyum, har kunngerðir um sjúkufyribyrgjandi rakstur og koppseting av alifiski hava ein sentralan leiklut. Deildin umsitur eisini djórasjúkulógina í mun til onnur djór, sosum kleyvdjór, flogfenað og kelidjór.*